## UTTAN ÚR HEIMI

# Løgreglan í London aftur løgd undir lygn

**Bretska løgreglan vil vera við, at tað finnast ongar myndir av tilburðinum, tá ein løgreglumaður skjeyt brasilan Jean Charles de Menezes, tí myndatólini vóru í ólagi. Tað er ósatt, sigur undirgrundarbeytin í London**

BRETLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Orsakað av einum tekniskum breki við eftirlitstólunum finnast ongar myndir av júst tí økinum, har tilburðurin var.

Soleiðis skrivar bretska løgreglan í frágreiðingini um tilburðin, tá ein løgreglumaður skjeyt brasilska elektrikaran Jean Charles de Menezes í undirgrundarbreytini í London. Men tað avsannar ein talsmaður hjá undirgrundarbreytini.

– Minst trý av myndatólunum har virkaðu, sum tey skuldu. Tað er einki, sum bendir á, at tey vóru í ólagi, sigur hann við blaðið Daily Mail.

Løgreglan sigur, at hon hevði tikið bondini úr myndatólunum dagin fyri tilburðin, tí hon skuldi kanna, hvat var á teimum, og at nýggj bond vóru ikki sett í. Men eisini tað avsannar undirgrundarbreytin. Tey siga, at verður eitt band tikið úr, kemur eitt annað í av sær sjálvum.

Jean Charles de Menezes bleiv skotin í einum undirgrundarvogni, og sambært løgregluni finnast ongar sjónbandsupptøkur av tilburðinum, tí eingin harðdiskur var í upptøkutólunum. Men felagið Northern Line, sum rekur undirgrundarvognarnar, sigur, at tað er ikki rætt. Talsmaðurin hjá felagnum sigur við Daily Mail, at alt var í lagi við upptøkutólunum.

Mánakvøldið komu tveir serfrøðingar hjá brasilsku løgregluni til London at kanna, hvat veruliga hendi, tá Jean Charles de Menezes bleiv skotin.

# Eldur og vatn herja Evropa



*Soleiðis sær út í sveitsiska býnum Bern, har áin Aare er farin upp um áarbakkarnar. Her er ein bjargingarbátur á veg ígjøgnum býin*

*Mynd: Reuters*

**Í Portugal, Spania og Fraklandi herja skógareldar, samstundis sum stór øki í Sveits, Eysturríki og Týsklandi standa undir í vatni**

VEÐUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Flogfør úr Fraklandi, Týsklandi, Spania og Italia eru komin til Portugals at hjálpa myndugleikunum har at sløkkja skógareldar, sum herja stór øki miðskeiðis í landinum. Serliga illa stendur til við býin Coimbra, har minst tólv hús í útjaðaranum á býnum eru brunnin í grund. Í gjár skuldu fleiri týskar og niðurlendskar tyrlur koma til Portugals at takla lut í sløkkiarbeiðinum.

Eldur er eisini í stórum skógarøkjum í landspørtunum Viana do Castelo og Viseu har norðuri í Portugal, og sambært myndugleikunum hara teir nøgvu skógareldarnir kravt minbst 15 mannalív, og umleið 140.000 hektarar liggja undir í øsku.

Tað hevur verið rættiliga fitt av vindi í Portugal teir seinastu dagarnar, og tað hevur darvað sløkkiarbeiðinum nógv. Haraftuimóti er ikki dropin komin av himli í longri tíð, men í gjár søgdu veðurmenninir sseg væntа regn ein av fyrstu døgunum.

Frakland og Spania eru eisini herjað av skógareldum. Við franska býin Perpignan eru stór skógarøki farin upp í royk, og í Spania er umleið 40 skógareldar í landspartinum Galicia, sum er í útnyrðingspartinum av landinum. Nærhendis Valencia á miðjarðarhavsstrondini er eisini eldur nógvastaðni.

### Vatnflóð

Í Sveits, Eysturríki og týska landspartinum Bayern eru tað aðrar náttúrukreftir, sum gera vart við seg. Har hevur tað regnað av grimd, so stór øki standa undir í vatni, og myndugleikarnir hava flutt fólk burtur nógvastaðni.

Í Sveits elvdi regnið til skriðulop nógvastaðni, og fleiri vegir hava staðið undir í vatni, so tað hevur ikki verið koyrandi til fleiri bygdir. Í bygdini Ibach máttu umleið 400 fólk flytast burtur, tá áin Muota fór upp um áarbakkarnar.

Í Bayern í Suðurtýsklandi hava myndugleikarnir lýst summi øki í undantaksstøðu, og skipaferðslan á Rhínánni er eisini darvað av áarførinum. Í Norðuritalia eru fleiri vegir stongdir, tí teir standa undir í vatni, og soleiðis er eisini í Eysturríki.

Havnar Bio
kall Coca-Cola




Herbie – for fuld udblæsning

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 24.08 | kl. 18.00 | kl. 20.15 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 18.00 | kl. 20.15 |

*Ensk tala – danskur tekstur*




The Island

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 24.08 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |




Hitchikers Guide to the Galaxy

| | | |
|---|---|---|
| Mikudag | 24.08 | kl. 22.45 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 22.45 |




Fantastic 4 Four

| | | |
|---|---|---|
| Mikudag | 24.08 | kl. 17.30 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 17.30 |

*Seinasta sýning*

Komandi filmar




Svigermonster *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 26.08




Dark Water *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 26.08

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu